Heðin Mortensen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um inntøkur landskassans frá vektgjaldi, skrásetingargjaldi og øðrum gjøldum á skrásettum akførum, settur landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Jørgeni Niclasen, (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvussu stórar inntøkur hevur landskassin árliga av vektgjaldi og skrásetingargjaldi á akfør, tolli og øðrum í sambandi við innflutning av akførum og avgjaldi á brennievni til akfør?
2. Hvussu stórur partur av hesum inntøkum fer til at bøta um og dagføra landsveganetið í Føroyum?
3. Heldur landsstýrismaðurin tað vera rætt og rímiligt, at ikki øll henda inntøka landskassans verður brúkt til landsveganetið?
4. Hevur landsstýrismaðurin í kvittanum at taka neyðug stig, so samsvar fæst millum tær inntøkur og útreiðslur, ið tað almenna hevur av skrásettum akførum?

Viðmerkingar:

Javnan hoyrist, at ov lítil játtan er til viðlíkahald av og ábøtur á vegakervið í Føroyum, og tí eru vegir niðurslitnir og vegateinar óhóskandi til ta ferðslu, sum er nú. Vegir, sum eru gjørdir í eini aðrari tíð og undir øðrum umstøðum, hóska ikki til bilferðsluna, sum hon er vorðin. Dagføringar tróta nógvastaðni, og regluliga asfaltering av landsvegunum kring landið sæst lítið til.

Samstundis hoyrist, at landskassin hevur stórar inntøkur av "bilparkini" í landinum, tí allir bileigarar tvær ferðir um árið skulu rinda vektgjald – ella vegskatt, sum tað enn eitur á mannamunni – umframt at allir bilar einaferð eru fluttir til landið og skrásettir, so har hevur landskassin havt bæði inntøkur av innflutninginum og skrásetingini. Haraftrat rinda bileigarar avgjald fyri hvønn litur av brennievni, teir brúka.

Stórar íløgur í innkomuvegir standa fyri framman og talan er um, at landið skal yvirtaka raksturin av Vága- og Norðoyatunlunum, tí tunnilsgjaldið skal burtur, umframt at nóg ringt er hjá Landsverki frammanundan at fáa neyðugu játtanina til landsvegirnar, og samstundis økist talið á bilum støðugt, so trýstið á samlaða landsveganetið økist stórliga.

Vónandi kann landsstýrismaðurin taka neyðug stig til at fáa javnvág millum inntøkur og útreiðslur landskassans av bilferðsluni, tí annars er vandi fyri, at mismunur verður gjørdur á teimum borgarum, ið hava bil, og teimum borgarum, ið ikki hava bil. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 28. desember 2020

Heðin Mortensen